NSÍ-GÍ 2-1 (2-0)

# NSÍ tendraði

**Runavíkingar fingu loksins nakað at fegnast um, tá teir fingu fult móti GÍ, men í Gøtu spyrja tey, hvussu tað bar til, at Jens Martin slapp snikkaleysur frá brotssparksdómi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Gøtumenn mundu missa ta allar seinastu vónina um heiðursmerki í ár, eftir at teir máttu stigaleysir aftur um Gøtueiði sunnudagin.

Runavíkingar hava annars ikki havt eitt ár, sum hoyrir heima millum tey minnisríkastu hjá felagnum, men serliga í fyrra hálvleiki glógvaði í teimum sunnudagin.,

Vertirnir løgdu fyri sum óløgi, og GÍ fekk snøgt sagt ikki beint til jørðina hesa fyrstu longu løtuna. Tað eydnaðist eisini heimaliðnum við stuttum millumbili at leggja seg á odda við tveimum málum, og í báðum førum var Ian Højgaard høvuðsmaður. Fyrst fann rituvíkingurin Ike við einum frísparksinnleggi, og bara tveir minuttir seinni kom Ian sjálvur á talvuna eftir uppspæl í høgru síðu.

## Einki kort

Og í roynd og veru kundu runavíkingarnir kanska fingið okkurt málið afturat fyri steðgin, men GÍ megnaði tó at halda tørn, fyri síðani at leggja harðliga fyri eftir steðgin. Kanskia fullu runavíkingarnir nú eisini nakað aftur á vøllin, soleiðis at GÍ-trýstið kundi gerast enn størri, men leingi var tó líkt til, at hetta ikki skuldi geva nakað úrslit.

GÍ fekk tó minkað um munin, tá Krzystof Popczynski vann sær eitt brotsspark, sum runavíkingarnir als ikki vóru nøgdir um, men tað var helst ikki tað, sum fekk størstu umrøðuna eftir dystin. Heldur var tað staðfestingin av, at hóast dómarin bríkslaði fyri brotssparki, tí hann metti Jens Martin hava tikið beinini undan pólverjanum, so valdi hann als ikki at geva kort fyri hendingina. Jens Martin hevði annars longu eitt gult kort á kontini, og tí hildu gøtumenn í øllum førum, at landsliðsmálverjin skuldi fingið march-ordra.

Hvussu var og ikki, so varð Súni Olsen settur at taka sær av brotssparkinum, og hetta gjørdi hann uttan stórvegis hóvasták. Bólturin varð umvegis tvørtræið hamraður í málið, og so fekk Jens Martin ikki gjørt stórvegis.

Seinastu løtuna royndi GÍ at trýsta fyri útjavningini, men tað eydnaðist teimum ikki at finna vegin fram við Jens Martini, og nú tykist tað standa minni væl til við heiðursmerkjadreymunum hjá GÍ. Ein sigur her hevði annars havt við sær, at frástøðan upp til Skála bert vildi verið tvey stig.

## Europa dregur

Enn eru sjálvandi níggju stig eftir at stríðast um, men tað skal fella væl í lag hjá GÍ, um teir nú skulu vinna seg upp á heiðursmerkjapláss. Ikki minst, tá ein av eftirverandi dystunum eisini er í Gundadali móti HB.

Runavíkingar hava somuleiðis 21 stig, men eins og í GÍ mugu teir helst eisini ásanna, at talan so ikki verður um metall í landskappingini í ár. Hinvegin, so hava runavíkingarnir longu vissa sær sæti í Europa til komandi kappingarár. Oddasessurin hjá HB hevur nevnliga við sær, at tapta steypafinalan gevur atgongd til UEFA-Cup, og einki er at ivast í, at NSÍ í so máta hevur rokkið eitt av málunum, sum vórðu sett undan kappingini.

### FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-GÍ 2-0 (2-1)**
1-0: Ikechuckwu Onyema, 21
2-0: Ian Højgaard, 23
2-1: Súni Olsen (br.), 76
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Gert Langgaard, Óli Hansen, Áki L. Hansen, Sjúrður Jacobsen – Andy Olsen, Kári Hansen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen (Jústinus R. Hansen, 74.) – Helgi L. Petersen (Einar Hansen, 89.), Ikechuckwu Onyema
**Gult kort:** Jens Martin Knudsen, 13., Ikechuckwu Onyema 90.
**GÍ:** Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Áslakur R. Petersen, Símun Louis Jacobsen (Poul Henning Jacobsen 80.), Adam Pauwelszek (Poul Andrias Jacobsen, 89.), Hans Pauli Petersen – Krzystof Popczynski, Súni Olsen
**Gult kort:** Poul Ennigarð, 85., Hans Pauli Petersen 13.
**Dómari:** Petur Skarðenni

# Stuðlarnir fylla eisini

**Tað er ikki bara sjálvt HB, sum hevur rundan dag í ár. Stuðlarnir fylla eisini 25 ár**

STUÐLARNIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í hesum sambandi hevði Eyðun Dahl-Christiansen gjørt eina tekning av verandi nevndini í HB-stuðlum, og eftir dystin kundi hann so handa tekningina til formannin í HB-stuðlum, Sólbjørn Thomsen.

Hetta er triðja árið, at Sólbjørn er formaður í HB-stuðlum, og við trimum gullmerkjum hesi árini er einki at siga til, at tað var ein nøgdur formaður, sum eftir dystin ynskti leikarunum tillukku.

– Eg haldi so ikki, at okkara partur hevur ligið eftir, men tað eru sjálvandi fyrst og fremst leikararnir, sum eiga æruna av gullinum, helt Sólbjørn.

Og við trimum gullmerkjum innan trý ár fær staðfestingin illa vera ein onnur, enn at Sólbjørn hevur verið ein góður formaður, men sjálvur vil hann einki siga, um hann eisini heldur fram í sessinum.

– Tað fáa vit at síggja.



*Sólbjørn Thomsen við tekningini, sum varð handað HB-stuðlunum eftir dystin*

*Mynd: Jan Müller*

Vit hava okkara aðalfund um ikki so langa tíð, og tá stendur mín sessur so fyri vali. So fáa vit at síggja, hvat limirnir halda, staðfesti hann at enda.

Umfram formannin, telir nevndin í HB-stuðlum seks aðrar limir. Tey eru Marianna Eysturoy, Ingi Gunnarson, Jógvan Páll Lassen, Regin Berg, Aage Samuelsen og Miriam Hinz.



Skála-KÍ 1-2 (0-1):

# KÍ helt seg til yvirtíðina

**Skála, sum saknaði fýra av stuðulsspælarunum, javnaði í síðsta minutti, men í stuttu tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat báðum umførunum, fingu klaksvíkingar sigursmálið**

SKÁLA-KÍ
*Jóannes Hansen*



*Skálamenn stríddust til fánýtis sunnudagin. KÍ tók øll stigini, og gav harvið javnaldranum úr Havn seinasta skumpið móti FM-heitinum*

Avrikið á Skála sunnudagin fer ikki í søgubøkurnar sum eitt av teimum frægu. Hvørki hjá Skála ella KÍ. Skála roysndi í 2. hálvleiki, tá ið teir tóktust eiga meiri orku enn gestirnir, at flyta bóltin skjótt runt. Men tað var trupult, tí saknurin í fleiri av føstu monnunum var so meinur.

Klaksvíkingar vóru avgjørt ikki komnir á Skála at undirhalda við poleraðum leikligum avriki. Teir vóru komnir fyri at sparka og stríða seg til trý stig, og tað eydnaðist. Tað vóru teir fegnir um. Hetta var triðja ferðin á rað, at teir fingu fult, og hesa ferð vunnu teir, eftir at teir tað mesta av 2. hálvleiki leikliga høvdu ligið undir.

So kann altíð vigast fyri og ímóti, um tað var tí, at fleiri á KÍ liðnum ikki eru í nóg góðari venjingarstøðu, ella um tað var tí, at konseptið var so primitivt, at størsti parturin av liðnum skuldi liggja aftarlaga á vøllinum — vongverjarnir tóktust hava fingið boð um ikki at fara fram um miðstrikuna - og sparka langt fram til Ova Nysted og Erling Fles, sum arbeiddu nógv, men sum í 2. hálvleiki høvdu lítið samband við aftaru keturnar.

Jan Andreasen, sum seinastu ferðirnar hevur verið í miðverjuni, var leikbannaður. Fyri at styrkja um miðverjuna var Atli Danielsen, sum heilt klárt var besti maður á vøllinum, fluttur aftur av álopskenda miðvallarplássinum og í miðverjuna. Tað hevði sjálvandi við sær, at uppspælið hjá KÍ ikki gjødist so sannførandi, sum tað kundi havt verið. Men miðverjan kundi ikki havt fingið betri styrk.

Jákup Mikkelsen var á beinkinum, meðan U-19 málmaðurin, Mattias Samuelsen, fyri fyrstu ferð vardi KÍ málið í landskappingardysti. Tað slapp hann heilt væl frá. Hóast ungur og harvið óroyndur, so smæddist hann ikki fyri at stýra garvaðu monnunum frammanfyri seg, hann var ósmæðin, tá ið hann tveitti seg í nærdyst við Pujo, og hann var tryggur, tá ið hann fór út í brotsteigin eftir innleggum.

Hjá Skála sást einki til Jónhard Frederiksberg, Nenad Stankovic, Dusan Jaic og Paula G. Hansen. Tað hevði við sær, at Johan Nielsen var noyddur at brúka fleiri av minni royndu spælarunum. Eitt nú var sentrali miðvøllurin mannaður púra av nýggjum. Sjálvandi kendist tað, at fleiri nýggir vóru við, men hóast teir mangladu fleiri av føstu monnunum, so høvdu skálamenninir lættari við at finna hvønn annan, enn klaksvíkingarnir høvdu tað.

Seinna partin av 2. hálvleiki legði Skála nógv fyri í royndini at javna. Tá vóru teir leikliga omaná, og tað kendist sum um, at um teir høvdu havt fingið eitt mál, so kundu teir so skjótt havt fingið fleiri. Iulian Florescu, sum í útgangsstøðuni var vongverji í vinstru, var síðsta korterið, tá ið Jóhannus Mikkelsen var komin á vongverjan, á miðvøllinum, og hóast hann tóktist hava hug at skúma ímóti einstøkum mótstøðumonnum, so darvaði hetta honum ikki í at vera sera vandamikil. Serliga var tað í deyðbóltunum, at hann var vandamikil, og ikki færri enn tríggjar ferðir nýtti hann avbera førleikan at sparka úr stórari fjarstøðu soleiðis, at bólturin tók í ovaru síðuna á tvørtrænum.

Sum oftast royndu skálamenninir at fáa spælið trýst ígjøgnum í høgra borði. Har var torført at sleppa framat, men tvær ferðir komu teir til fløt innlegg, sum kundu havt verið vandamikil. Alexandur Johansen lá og bíðaði í vinstru. Hann var ofta arbeiðsleysur, men í síðsta minuttinum í vanligu leiktíðini fekk hann møguleikan, hann títtaði og dyrgdi eftir brotssparkinum. Tað eydnaðist, og tá ið Iulian Florescu hevði umsett úr ellivu metrum, tóktist tað sum um, at Skála hevði bjargað sær eitt stig. Men soleiðis tørnaði tað ikki út.

## KÍ og yvirtíðin

KÍ skoraði tvey mál í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Í 1. hálvleiki var tað Ovi Nysted, sum við fínum stútara smekkaði bóltin upp í málhornið. Jan Joensen, sum aftur hesa ferð var rættuliga drúgvur, vann á miðstrikuni bóltin av skálamonnum, Arnhold Joensen fór við ferð fram í høgru, innleggið til handara stólpan var neyvt, og Ovi Nysted smekkaði krúllin undir bóltin.

Erling Fles og Ovi Nysted fingu eftir fløt innlegg úr høgru onkrar stórar møguleikar, uttan at nakað spurdist burturúr. Tá ið Skála hevði javnað til 1-1, og vanliga leiktíðin var farin, sást tað væl, at klaksvíkingar kendu tað sum um, at teir høvdu mist tvey stig. Men í síðsta álopinum eydnaðist aftur hjá KÍ. Eyðun Klakstein, sum aftur hesa ferð var millum teir mest eyðsýndu, tiltuskaði sær fríspark í vinstru, Arnhold Joensen legði í brotsteigin, og meðan fleiri skálamenn hingu uppi í Ova Nysted, stýrdi púra leysi Erling Fles mitt fyri málinum og einar tríggjar metrar frá strikuni við høvdinum bóltinum í málið. Og so var lagið gott á klaksvíkingum, meðan tað kendist á skálamonnum, at nú vóru tað teir, sum høvdu mist eitt stig.

### FAKTA UM DYSTIN

**Skála-KÍ 1-2 (0-1)**
0-1: Ovi Nysted 45.
1-1: Iulian Florescu br 89.
1-2: Erling Fles 90.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**Skála:** Igor Bjarni Kostic — Rói Jacobsen, Rúni Rasmussen, Arnhold Berg, Iulian Florescu — Hanus Thorleifsson, Bárður Danielsen, Sveinur Justinussen, Alexandur Johansen — Bogi Gregersen (Jóhannus Mikkelsen, 78.), Eugen Marian Stanciu
**Gult kort:** Eugen Marian Stanciu
**KÍ:** Mattias Samuelsen — Leon Bjartalíð, Atli Danielsen, Niclas Niclassen, Símun Joensen — Arnhold Joensen, Jan Joensen, Jacob Bymar, Eyðun Klakstein — Erling Fles, Ovi Nysted
**Gult kort:** Símun Joensen, Ovi Nysted

# Skála vinnur ikki á KÍ

**Í seks landskappingardystum hevur tað ikki eydnast Skála at fingið fult, tá ið teir hava spælt ímóti klaksvíkingum**

SKÁLA KOMPLEKS
*Jóannes Hansen*

Skála hevur staðið seg munandi betri í ár, enn teir gjørdu tey bæði fyrstu árini, sum liðið hjá teimum var í bestu deildini. Tá stríddust teir fyri lívinum í bestu deildini. Nú stríðast teir fyri at vinna fyrsta settið av heiðurskrónum.

KÍ fór sunnudagin av Skála við øllum stigunum. Tað hava teir gjørt tvær av trimum møguligum ferðum. Í fjør vunnu teir 2-0 og í fyrraárið endaði tað 2-2. Tað vil altso siga, at higartil hava skálamenn ikki fingið fult, tá ið klaksvíkingar hava vitjað.

Fyrr í summar endaði tað 1-1, tá ið Skála vitjaði í Klaksvík. Í fjør og í fyrraárið vann KÍ heimadystirnar ímóti Skála. Í fjør vunnu teir í 15. umfarinum — ella sama umfarinum sum teir sunnudagin vóru á Skála — 7-0, og í fyrraárið var úrslitið 4-0.